

*Restorffs Garður, har Maurentius helt sínar røður*



*Avhaldshúsið var eitt tilhaldsstað hjá ungdóminum í Havn. Fremst á myndini sæst grundin til gamla apotek á Vaglinum*



*Maurentius við Stein hevur verið um 20 ára aldur, tá hann fór at berjast fyri sosialismu í Føroyum, sum tað er greitt frá í Baldursbrá. Hann varð valdur inn á ting fyri javnaðarflokkin í 1928. Men hann var meira víttgangandi enn flokkurin var sjálvt tá og fór úr javnaðarflokkinum aftur*

siga – "lutter Øre". Eg troðkaði meg fram at vita, hvat ið hann talaði um:

"Tit mugu eisini í hesum sum í øllum øðrum, ið eg havi sagt, geva mær rætt í, at hetta er ein heilt út av lagi smíðað lóg, at eingin skal hava loyvi til at velja ríkisdagsmenn fyrr enn hann er 30 ár, og hvaðna verri, at ein ikki skal fáa loyvi til at velja løgtingsmenn, fyrr enn hann er 25 ára gamalur. Halda tit ikki, at maðurin, sum hevði verið í Amerika, hevði rætt, tá hann segði, at "ilt er at vita, at ein ið hevur verið í Amerika og valt Norðamerikas hægsta mann, presidentin, kemur aftur til Føroyar og fær ikki loyvi til at velja nøkur vesalavættir har niðan", hann peikar niðan móti tinghúsinum, "tí sigi eg, at ein, ið ikki er vorðin hugsandi maður, tá ið hann er 20 ár, verður tað sanniliga heldur ikki fimm ár seinni. Tí biði eg tykkum við mær: "Rópið eitt hurrá, livi upplýsingin, livi ungfólkið og livið socialdemokratiið". Og alt ungmannaliðið rópti trý hurrá, so tað skulvu bæði torpar og garðar, og kavin datt niður av trøunum í Restorffs garði.

Maurentius hvarv í mannamúgvuni "som et Stjerneskud".

## Livið Maurentius!

Eg gekk mær niðan í avhaldshúsið at dansa, og løgið var tað, at Maurentius dansaði ikki. Eg trein dansin eina løtu og fór so út aftur og hoyrdi eg sovorðið málageip á Húsabrúgv. Eg gekk eftir ljóðinum og fann her aftur Maurentius talandi, ikki sum í áðni á norðoyamáli, men á sandoyarmáli: "Tað er ikki langt síðani, eg seinastu ferð talaði um hetta evni, sum eg nú tosi um. Er tað ikki margháttligt, at vit synir av foldini skulu ganga og síggja, hvussu teir menninir, sum eiga teir tungu pengaposarnar, fara við ogum og ogara. Eru tað ikki vit, sum skulu reisa okkum móti hesum pengagrísku – eg vil ikki siga tjóvunum, ikki røvarum, men pengagrísku monnunum, sum ríða á pengagrísinum. Vit skulu gera okkara plikt – krevja okkara rætt – arbeiða við góðum huga – krevja okkara løn.

Maurentius deklareraði:

*Í stríðnum sum nú dunar víða um lond*
*so mangur er boygdur í knæ*
*tí fylkist og takið hvønn annan í hond*
*í trúgv til tann komandi dag.*
*Við tjald ogur reisa til verju í neyð*
*til arbeiðis lív ella deyð!*

Ungfólkið rópti : "Livi Maurentius!"

"Nú byrjar dansurin í losjuni tú hin rádni," helt Maurentius – hann fær eyga á meg, "Lat okkum fylgjast niðan", fóru inn í dansin og dansaðu við góðum huga, men eina løtu aftaná var Maurentius horvin.

## En Satans Karl

Eg fór út at leita eftir honum og gekk mær oman eftir Tinghúsvegnum. Millum báðar tinghústrappurnar stóð hann sanniliga aftur og talaði, ikki á norðoyamáli, ikki á sandoyarmáli men á kølbláum donskum sum Kollareyði plagar at taka til.

Helst mundi tað vera tí, at tað vóru so nógvir danskarar til staðar:

"Mine ærede Herrer, Landsmænd for at bruge et her i Thorshavn meget yndet Ord – eller mine Brødre. Vi er jo alle Sønner af samme Mor.

Hør Brødre! Jorden er det oprindelige, det evige Grundlag for Menneskenes Tilværelse. Om Ejendomsretten til de Ting, der findes paa Jorden, som Menneskene producerer, og som bestandig maa fremskaffes paany, kan der vel strides. Men om Ejendomsretten til Jorden, som er "Fundamentet" hvorpaa vi er satte til at bygge, bo og arbejde, er overhovedet ingen Strid mulig.

Kloden er ikke skabt ved Menneskehaand. Vi kan ikke forøge eller formindske den, og den bliver evindelig den samme. Ethvert Menneske er derfor født med i det mindste en uomstridelig, man kan sige guddommelig Ret, nemlig Ejendomsretten til den Jord, hvorpaa det er sat til at leve og arbejde.

Men naar dette erkendes, da maa denne Ret ogsaa være lige for alle Mennesker, enten de er fødte i Hytten eller i Borgen. Ingen vil paastaa, at Grevens Barn er født med en større Ret til Livet end Arbejderens, og selv om tidligere Slægter har ladet sig fratage deres medfødte Ret til Jorden, saa er derved ikke skabt nogen ny og hellig Ret. Hver Slægt kan kræve sin Andel i det, som er alle Mennerskers Eje.

Socialismen er ikke noget nyt, f.eks. i Frankrig. Vi kender alle Franskmændenes Samd Simon, der i 1777 i en alder af 19 Aar agiterede for den ægte Socialisme. Paa Gader og Stræder talte han, og Socialismen har sikkert mistet en af sine bedste Forkæmpere, da han døde i en Alder af 65 Aar.

I England begyndte den lidt senere. Vi kender for eksempel den engelske Digter George Byron, der som ingen anden hudflettede Snobberiet og Skinhelligheden i det saakaldte gode Selskab. Han døde i en alder af 36 Aar i 1824.

Nogle Aar senere kom den til Tyskland og senere til Danmark.

Vi er alle sammen Socialister – det er Vorherre ogsaa – han vil have hvad han kan faa, og det vil vi saa sandelig ogsaa."

Her endaðu Maurentius røðu sína, og teir hildu allir sum ein: "Det var dog en Satans Karl, altsaa findes der ogsaa Socialister her."

## Leingi livi sosialistarnir

Eg tók í Maurentius, tí eg væntaði, at hann kom at vera ov íðin í síni socialistisku agitiatión og bað hann tí koma at dansa. Vit fóru so oman í Avhaldshúsið og dansaðu. Teir kvóðu Fuglakvæðið, og Maurentius royndi at kvøða við tað, hann kundi og rópa tað, hann var mentur.

Dansurin endaði og fylgjandi við nøkrum gentum og dreingjum fóru vit niðan á Sanatoriuvegin, sum í kvøld eins og øll onnur kvøld var breiður nokk.

Tá ið vit komu til tann stóra viðaskógvin, sum nú verður røktaður av tí manni, sum var føddur við urtagarðsforstand og ber tað havgirda navnið Tróndur, hostaði Maurentius og bað fólkið steðga. Tey støðgaðu, og Maurentius settist upp á hagagrindina, hostaði aftur, og helt somu røðu, sum hitt kvøldið, tá hann leiddi inn til tjak í ungmannafelagnum.

Tá røðan var at enda "deklareraði" hann soljóðandi ørindi:

*Tann sveitti sum rennur av strevi og stríð*
*væl nørir um ríkmannabjølg,*
*og prestarnir lýsa ta komandi tíð*
*til heljar til devil og dølg.*
*Teir køva tó ikki tað rópið sum beyð*
*til arbeiðið lív ella deyð.*

Maurentius leyp niður av hagagrindini, og var eg kvikur at fáa fatur á honum. Vit stevndu omaneftir og múgvan aftaná, øll fylgjandi honum út á Reynargarð, bóðu góða nátt og takkaðu honum fyri hansara nógvu og góðu røður og róptu: "Leingi livi socialistarnir og Maurentius við Stein "hurrá!"

**Ein áhoyrari**

**Komandi Miðvika**
Í 1908 var ein stórhending, tá ið Sanatoriið varð tikið í brúk. Vit fara seinni at umrøða sanatoriið nærri, men í komandi parti verður nakað av hesi 100 ára søgu, serliga við atliti til tey frímerki, sum eru givin út í hesum sambandi.

Sosialurin